# Koyrikortið hongur í klønum tráði

**Ein bilførari var tikin við ríkiligari ferð í Kollafirði í gjár**

Tað hendir seg meiri enn so, at bilførarar sleppa væl frá at koyra skjótari enn loyvt er. Men tað hendir seg sanniliga eisini meiri enn so, at teir ikki sleppa væl frá tí.

Og kann tað koma at hanga sum eitt svørð yvir teirra høvdi í fleiri ár

Í gjár gjørdi løgreglan ferðkanningar í Kollafirði og har varð ein bilførari tikin fyri at koyra alt ov skjótt.

Hann koyrdi 117 kilometrar um tíman á einum strekki, har tað einans er loyvt at koyra 80.

Tað merkir at hann fær bót. Men harafturat missur hann koyrikortið treytað í trý ár.

Sostatt hevur hann fingið gult kort Men tað merkir so eisini, at fremur hann líknandi brot á ferðslulógina einaferð afturat tey næstu trý árini er ongin vegur uttanum: So verður kortið tikið.

Tað merkir, at verður hann eina ferð afturat tey næstu trý árini tikin fyri at koyra meiri enn 110 kilometrar um tíman, har tað er loyvt at koyra 80 missur hann koyrikortið. Sama sama ger seg galdandi, verður hann aftur tikin fyri at koyra meiri enn 80, har tað er loyvt at koyra 50, ella vissi hann koyrir ávirkaður, ikki heldur treytaleysa víkiskyldu.

Men eisini onnur brot á ferðslulógina hava somu avleiðingar við sær.

### Helt ikki víkiskyldu

Ein annar maður skal eisini ansa sær serliga væl í ferðsluni tey næstu árini. Í gjákrvøldið helt hann ikki treytaleysa víkiskyldu í einum krossvegi í Havn og tað førdi til, at hann rendi á ein annan vil.

Skaðin var ikki stórur, men av tí at hann ikki helt treytaleysa víkiskyldu, eru eisini útlit fyri, at hann missur koyrikortið treytað í trý ár.

-áki-

# Knívurin og fartelefonin bjargaði honum



*Tað var her við bygningarnar í Mjórkadali, at ein bilur fór útav. Ongin sá óhappið og ongin sá bilin. Ein knívur og ein fartelefon bjargaði manninum*

-áki-

**Ein maður slapp ómetaliga væl frá einum hóhappið leygarmorgunin**

Ein bilførari slapp ómetaliga væl frá einum óhappi leygarmorgunin. Ein maður var farin einsamallur í bili norður eftir Oyggj. Men í Mjórkadali fór hann oman av vegnum. Bilurin bóltaði runt nakrar ferðir og bilførarin kom at liggja fastur undir bilinum.

Alt apparatið varð sett í sving og tey fingu bjarga manninum undan bilinum. Hann varð førdur á Landssjúkrahúsið til kanningar, men er sloppin uttan mein, sigur løgreglan.

Vakthavandi á politistøðini í morgun kendi ikki smálutirnar í málinum. Men um vikuskiftið greiddi løgreglan Útvarpinum frá óhappinum og tað er eitt dømi um, hvussu væl tað ber til at sleppa, tá ið hepni er við í viðførinum.

Politisturin greiddi frá, at maðurin kom at liggja við arminum í klemmu undir einum hjóli og slapp ongan veg.

Men tívetur hevði hann knív uppi á sær. Við honum fekk hann sprett jakkan upp, so at hann fekk gatur á fartelefonini og fekk sent boð eftir hjálp.

Hevði hann ikki havt knígv uppi á sær, kundi verið illa vorðið, tí tað var rættiliga kalt og onki sást til óhappi frá vegnum. Onkrir bilar høvdu koyrt framvið uttan at óra ilt.

# Kann føra til nýggja stovnsmeting av grindhvali

**Í summar verður farið undir mest umfatandi hvalateljingina higartil**

HVALUR OG KÓPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Úrslitið av stórari hvalateljing í summar, kann føra til, at stovnurin av grindahvali um okkara leiðir, verður endurskoðaður*

Í hesi vikuni verður ársfundur hjá NAMMCO hildin í Tromsø í Noregi. NAMMCO er Norðuratlantiska nevndin fyri havsúgdýr, og limalondini eru Føroyar, Ísland, Noreg og Grønland. Harumframt luttaka Kanada, Japan, Danmark og Russland sum eygleiðarar og fundurin verður í morgin, mikudagin og hósdagin, sigur Fiskimálaráðið í tíðindaskrivi.

Á fundinum fer vísindanevndin hjá NAMMCO at leggja fram niðurstøður og tilmæli um ymsar hvala- og kópastovnar. Hetta eru niðurstøður og tilmæli, sum NAMMCO, hevur biðið um.

### Kann føra til nýggja stovnsmeting

Annars skal ein umfatandi hvalateljing gerast í summar. Tað er vísindanevndin hjá NAMMCO, sum samskipað teljingina og hetta verður mest umfatandi hvalateljingin higartil, tí umframt øll NAMMCO limalondini, fara eisini Kanada og Russland at vera við í teljingunum hesaferð.

Úrslitini av teljingunum kunnu føra til, at stovnsmetingin av grindahvali á okkara leiðum skal endurskoðast.

NAMMCO hevur eisini stovnað eina nýggja umsitingarnevnd fyri kóp og hon fer at halda sín fyrsta fund næstu viku.

Kanada hevur eisini víst áhuga fyri at hava ein virknan leiklut í hesi nevndini, sum er einasta milllumlanda samstarv sum er um umsiting av kópastovnum.

### Samstarva við onnur

Í NAMMCO er eisini eitt virkið tekniskt samstarv ímillum veiðimenn og djóralæknaserfrøðingar um at avlíva hval og kóp.

Har hava Føroyar havt gott høvi at kunna onnur um at drepa grindahval og eisini hava vit havt gott høvi læra av øðrum.

Seinastu úrslitini frá hesum arbeiði verður eisini viðgjørt á ársfundinum í Tromsø

NAMMCO hevur eisini eina eygleiðaraskipan, sum gevur limalondum høvi at halda eyga við, hvussu væl eftirlitið við hvala- og kópaveiða í hinum londunum virkar.

Í ár er ætlanin at ein NAMMCO eygleiðari fer at fylgja við í íslendsku stórhvalaveiðini.

Føroyar hava havt formansskapin í NAMMCO síðan 2004, tað er Kate Sanderson, serfrøðingur

í Fiskimálaráðnum, sum er forkvinna.

Í føroysku sendinevndini, sum fer á NAMMCO ársfund verða: Ulla Svarrer Wang, ráðgevari í Fiskimálaráðnum, Bjarni Mikkelsen og Geneviève Desportes á Náttúrugripasavninum, Jústines Olsen, djóralækni og Ólavur Sjúrðarberg í Grindamannafelagið.